# Fiskasølan setir álitið á kinesarar

**Prísurin á rækjum er nú tann vánaligasti í eini 10-15 ár. Fiskasølan setir álitið á, at prísurin fer at hækka eitt sindur, nú kinesarar fara at keypa til veturin. Men enn er onki hent**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*



*Rækjuprísurin er enn út av lagi vánaligur og fyri at gera ilt verri, er dollarin eisini munandi fallin. Men kemur gongd á søluna til fjareystur í vetur, sum vit vóna, hann støðan broytast rættiliga skjótt til tað betra, men enn eru ongir glottar at hóma, sigur stjórin á Fiskasøluni*

Fyrr í ár var eitt sindur at hoyra um, at føroyska rækjuvinnan rættiliga var komin í trongstøðu, tí at prísurin á rækjum var lækkaður so nógv.

Og enn tykist tíverri ikki, sum um nakar stórvegis glotti er at hóma.

– Prísurin á rækjum hevur ikki verið so vánaligur seinastu 10-15 árini, sum hann er nú, sigur Hans Johannus á Brúgv, stjóri á fiskasøluni.

Hann sigur, at fyri at gera tað ilt verri, er dollarin eisini munandi lækkaður seinastu tíðina afturat tí, at sjálvur prísurin er ógvuliga lágur og sostatt fæst enn minni fyri rækjurnar.

Og hann leggur afturat, at enn eru ongir glottar at hóma, sum benda á, at prísirnir fara uppeftir aftur.

– Enn ber ikki til at siga nakað positivt um rækjumarknaðin, sigur fiskasølustjórin.

Hann sigur, at prísurin er lækkaður so nógv, at eitt skifti løgdu teir kanadisku rækjutrolararnir, sum fiskaðu í heimasjógvi.

### Seta álitið á kinesarar

Hann sigur, at fiskasølan hevur sett sítt álit á, at prísurin fer at hækka, tá ið londini í fjareystri, einamest Kina, fara at keypa til veturin.

Men tað er ikki, fyrrenn nú í august, at hesi londini fara at keypa, so gongd er ikki komin á enn, og tí er tað ov tíðliga at siga nakað um tað enn.

Hans Johannus á Brúgv sigur, at onkrir kinesarir hava verið í Føroyum og hugt eftir rækjum við tí fyri eyga at keypa.

– Men enn er at kalla onki selt, og hartil er prísurin vánaligur, so tað er ilt at siga, hvat spyrst burturúr. Tann vánaliga støðan á rækjumarknaðinum hevur ført við sær, at rækjurnar, sum verða fiskaðar, fyri tað mesta verða lagdar á goymslu.

– Tað sigst, at tað liggur heilt nógv av rækjum á goymslu, men ongin vil siga, hvussu stórar goymslurnar eru.

Eisini føroyingar hava nógv á goymslu, men heldur ikki Johannus á Brúgv vil siga, akkurát, hvussu stórar tær eru.

– Goymslurnar eru stórar. Men tær eru kortini ikki størri enn so, enn at vit hava fult tamarhald á støðuni.

Hann sigur, at nakað síðani varð mett, at eini 20.000 tons av rækjum lógu á goymslu runt um í Evropa.

– Hinvegin brúka londini í fjareystri eini 30.000 um árið, og tað allarmesta av tí keypa teir vetrarhálvárið. So tað kann vera so skjótt, at goymslurnar minka aftur. So hóast fiskasølustjórin ongan glotta hómar enn, hevur hann vónir um, at støðan fer at batnað komandi árini.

Hans Johannus á Brúgv sigur, at orsøkin til tað stóra prísfallið á rækjum er heilt einfalt, at tað verður fiskað meiri av rækjum enn tað verður etið.

– Men kemur gongd á søluna til eitt mú fjareystur, kann støðan broytast rættiliga skjótt til tað betra, leggur hann afturat.

## Føroysk rækjuskip vilja hava studning

**– Vit hava mælt til, at skipini fáa eina afturbering fyri at fiska í altjóða sjógvi, sigur formaðurin í felagnum rækjuskipunum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

Føroysku rækjuskipini vilja nú hava okkurt slag av studningi.

Jákup Egholm Hansen, formaður í felagnum rækjuskipum, sigur, at vinnan hevur mælt politiska myndugleikanum til, at gera eina ella aðra FAS-líknandi skipan fyri rækjuskip, sum fiska í altjóða sjógvi.

Tvs, at vinnan mælir til, at skip, sum fiska í altjóða sjógvi, skulu fáa okkurt slag av lønarafturbering frá tí almenna.

Hann sigur, at herfyri hevði vinnan fund við Landsstýrið at kunna politiska myndugleikan um støðuna, men enn hava tey onki hoyrt aftur. Hann leggur tó dent á, at hetta var bara ein kunnandi fundur og ikki ein umsókn um stuðul.

Formaðurin í Felagnum Rækjuskipum, sigur, at munurin fyri fiskiskap í altjóða sjógvi eru ókeypis, mótvegis øðrum fiskiveiðiavtalum, sum vit gjalda líka nógv fyri tað, vit fáa.

Harafturat fiska rækjuskipini langt burtur, eitt nú á Flemish Cap og tað er dýrt at flyta fiskin til Evropa og at fáa manning og útgerð yvir.

– Tí eru fortreytirnar hjá rækjuskipunum munandi øðrvísi enn hjá skipunum, sum fiska sambært fiskivinnuavtalum við onnur lond.

Hann sigur, at ein FAS líknandi skipan kundi bøtt um støðuna hjá skipunum, bæði beint nú og í longdini.

–Tað kundi eisini gjørt tað meiri lokkandi at roynt møguleikar í altjóða sjógvi. Eitt nú er tað bara eitt fisk, sum roynir eftir búrfiski, men kanska er tað grundarlag fyri einum, ella tveimum skipum afturat.

– Men sum støðan er, er tað ongin, sum hevur fíggjarliga orku til at taka vágan, tí tað eru ikki ráð til, at tað gongur galið, sigur Jákup Egholm Hansen.

Tilsamans eru 12 rækjuskip í føroyska flotanum, men tvey teirra hava tíðaravmarkað loyvi.

## Onki ljós fyri framman

**– Støðan hjá rækjuflotanum er avbera vánalig og tíverri eru als ongi útlit fyri, at tað fer at batnað. Men rækjuflotin tolir ikki fleiri so vánalig ár, sigur formaðurin í felagnum Rækjuskipum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*



*– Rækjuflotin tolir ikki fleiri rakár afturat, sigur Jákup Egholm Hansen, formaður í felagnum Rækjuskipum*

– Tað er minst líka galið enn. Ongin bati er hendur seinastu tíðina. Men tað ringasta er, at tað eru heldur ikki útlit fyri nøkrum bata.

Jákup Egholm Hansen, formaður í felagnum Rækjuskipum er ikki serliga bjartskygdur um støðuna hjá føroyska rækjuflotanum.

Hann sigur, at tað eru ongar broytingar verið í prísinum til tað betra, hvørki í prísinum á ídnaðarrækjum, ella á kókaðum rækjum.

– Tað er heldur tvørturímóti, tí á ídnaðarrækjum er prísurin versnaður uppaftur meiri, síðani í vár.

### Ongin bati

Hann sigur, at summi hava væntað, at støðan fór at batnað nú tað líður ímóti vetri aftur.

Men tað torir hann ikki at vóna.

– Tað trúgvi eg lítið upp á, tí tað ljóðar nevniliga, at teir, sum keypa pilkaðar rækjur, hava longu fyri ein stóran part gjørt sáttmálar fyri tað, sum vit plaga at kalla jólasølan.

Hann sigur, at tað hava keypararnir sjálvsagt gjørt, tí at rækjurnar eru so bíligar beint nú, at tær fáast ikki bíligari og tí eru teir so skjótir at gera sáttmálar.

– Vanliga plágar prísurin at fara uppeftir í oktober og novembar, ímeðan jólasølan er fyri. Men eru sáttmálarnir til tað longu gjørdir, eru ongir glottar at hóma í tí sambandi í ár.

Jákup Egholm Hansen sigur, at nakar bati er tí ikki væntandi, fyrrenn í fyrsta lagi næsta vár, um nøkur broyting verður yvirhøvur. Hvussu prísurin er á rækjum, veldst í stóran mun um støddina. Men, hvat ídnaðarrækjum viðvíkur, er prísurin fallin heilt niður á 5-8,50 krónur fyri kilo.

Hann sigur, at fyri ein summartúr plaga skipini at fáa ímillum 8 og 13-14 krónur fyri ídnaðarrækjurnar.

– Hvat kókaðum rækjum viðvíkur, er sama gongdin. Rækjur, sum vit í fjør seldu fyri 26,50 krónur fyri kilo, fáa vit ikki meiri enn 18-19 krónur fyri nú.

Jákup Egholm sigur, at tað tykist sum um at tað eru kinesarar, sum stýra marknaðinum á teimum smáu rækjunum og teir hava trýst prísin í botn.

– Prísurin er nú so lágur, at tað eru at kalla bara kanadiarar, sum klára art selja fyri tann prísin og tað klára teir bara tí at teir fiska eina ómetaliga stóra nøgd.

Formaðurin í rækjuskipum sigur, at tá ið prísurin á teimum smáu rækjunum verður trýstur niður, fylgir prísurin á hinum rækjunum aftaná.

### Tola ikki fleiri ár

Jákup Egholm Hansen sigur, at hetta er annað árið á rað, sum er serstakliga vánaligt hjá rækjuflotanum.

– Hetta er ein støða, sum fíggjarliga rakar skipini ógvuliga hart og tað er púra greitt, at flotin tolir ikki fleiri so vánalig ár, sum hesi bæði seinastu, so koma skipini í gjaldføristrupulleikar.

Hann vísir á, at rækjuflotin er frammanundan ikki serliga væl fyri, tí hann hevur ikki havt nøkur serliga góð ár síðani í sjeytiárunum.

– Rækjuflotin hevur havt onkantíð havt nøkur gullár í mannaminni, Tí er hann verri fyri fíggjarliga, enn summir av hinum skipabólkunum, sum hava havt nøkur sera góð ár inn ímillum. Tá ið rækjuflotin so harafturat renur seg í fleiri sera vánalig ár sum nú, er tað púra greitt, at summi skip eru rættiliga illa fyri, sigur formaðurin í felagnum fyri Rækjuskip.



# Ferðavinnan skal vera sjálvberandi

**Ein nevnd, sum hevur arbeitt við at gera eitt uppskot um ferðavinnupolitikk, handaði hósdagin Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, lidna uppskotið. Bæði nevnd og landsstýrismaður tykjast á einum máli um, at ferðavinnan skal vera sjálvberandi.**

FERÐAVINNA
*Heri á Rógvi*



*Bjarni Djurholm heldur at føroyingar skulu royna at fáa múgvandi ferðafólk til Føroya*

Arbeiðið við at orða ein almennan ferðavinnupolitikk fór í gongd síðst í 1999. Nevndin, sum varð sett at orða politikkin fekk soljóðandi orðing sum endamálsorðing: “at orða uppskot um, hvussu tað almenna kann vera við til at skipa og menna Føroyar sum ferðamannaland, soleiðis at ferðavinnan verður ein meiri týðandi táttur í samfelagsbúskapinum”.

Nevndin, sum varð sett at orða politikkin varð mannað av: Atli Eiriksson, fulltrúi í Vinnumálastýrinum, formaður og skrivari í arbeiðsbólkinum, Petur Oliver í Hoyvík, formaður í stýri Ferðaráðsins, Annika W. Joensen, stjóri, Ferðaráð Føroya, Hjørdis Zachariassen, innlendisdeild Ferðaráðsins,Uni Danielsen, stjóri, Flogfelag Føroya, formaður í Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya og Fríðun Hansen, deildarleiðari á Smyril Line.

Síðan Annika W. Joensen fór í annað starv, hevur Heri Niclasen, stjóri Ferðaráðsins, verið limur í bólkinum.

Uppskotið hevur verið til ummælis síðani apríl í ár, og innkomnu viðmerkingarnar eru saman við uppskotinum samanskrivað til hetta nýggja uppskotið um ferðavinnupolitikk.

Síðani hevur ein minni bólkur, samansettur av Hera Niclasen, stjóra á Ferðaráðnum, Kjartani Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni og Evu H. Bennicke, fulltrúa í Vínnumálastýrinum, hevur samanskrivað uppskotið til politikkin.

### Í tøkum tíma

Tað var Eva H. Bennicke, sum vegna bæði nevnd og bólk handaði Bjarna Djurholm, landsstýrismanni uppskotið. Eva H. Bennicke legði fram, hvat bólkurin hevði lagt dent á. Hon vísti eisini á, at tað er nøkur viðurskifti, sum fella uttanfyri økið hjá vinnumálastýrinum. Uppskotið er umbiðið av vinnumálastýrinum. í uppskotinum verður tað, eftir førimuni, útgreina í sambandi við endamálsorðingina.

Uppskotið er rættiliga stutt í mun til onnur líknandi uppskot. Einans tólv A4 síður telur uppskotið. Upprunaliga uppskotið var munandi longri. Tað, at tað er stytt so mikið, er eisini nakað, sum bólkurin, ið samanskrivaði uppskotið, hevur lagt seg eftir. Bjarna Djurholm, landsstýrismaður, fegnaðist eisini yvir, at uppskotið var so mikið stutt, soleiðis at tað ikki bert vóru tey, sum vórðu noydd at lesa tað, ið lósu tað.

Landsstýrismaðurin segði eisini, at nógv viðurskifti hava ligið á láni innan ferðavinnuøki, og eitt tílíkt uppskot er tískil ógvuliga kærkomið.

Bjarni Djurholm vísti somuleiðis á, at lógararbeiðið við at áseta greiðari reglar fyri Ferðaráð Føroya ikki var langt frammi í tíðini.

– Tað hevur stórur saknur á greiðari reglum fyri Ferðaráðið. Serliga spurningurin um, hvør eigur evsta vald eigur at vera loystur. Hetta vil bara gera tað léttari hjá Ferðaráðnum at virka, sigur Bjarni Djurholm.

Uppskotið leggur upp til, at ferðavinnan skal vera sjálvberandi. Ætlanin er, at leikluturin hjá tí almenna skal vera at tryggja karmarnar við eitt nú at betra um infrastrukturin. Sjálvt uppskotið leggur ikki upp til nakran ávísan málbólk, men heldur, hvussu umstøðurnar sum heild kunnu betrast, og hvussu ein gevandi ferðavinna kann koma fyri seg í Føroyum. Millum málini, sum uppskotið leggur upp til at miðjað verður ímoti, er at skapa Føroyum meiri viðurkenning uttanlands.

Sjálvur er Bjarni Djurholm ikki í iva:

– Vit mugu hava ferðafólk handavegin, sum hava nógvan kapital. Tað snýr seg um at vinna so nógvan pening sum gjørligt. Krabbagoggurnar skulu sjálvandi vera vælkomnar, men tað eigur ikki at vera hesi, sum satsað verður uppá, sigur Bjarni Djurholm.

Eisini nevnir sami landsstýrismaður, at tað í sambandi við eina sjálvberandi ferðavinnu væl kann hugsast, at Atlantic Airways, í øllum førum partar av fyritøkuni, verður selt.

### Øll nøgd

Tey, sum hava arbeitt við at orða henda nýggja ferðavinnupolitkk umboða øll ymiskar partar av ferðavinnuni. Eisini hjá teimum tykjast tað at vera konsensus um, at hetta er eitt gott arbeiðið, sum er latið úr hondum. Saman við hesi uppskotinum, varð eisini handað ein frágreiðing um »Nátt- og Tvátthús, dvalavíkar og tjalding«.

Umboðini úr ferðavinnuni tykjast á einum máli um, at hetta er ein gongd leið við hesum báðum, frágreiðing og uppskotið.

Øll tykjast at halda, at hetta arbeiðið kann brúkast til at fáa eitt gott úrslit.

Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, vísti á eitt øking í ferðafólkatali er síggja fyri tey seinstu árini. Bæði Heri Niclasen, Kjartan Kristiansen, stjóri á menningarstovuni og Petur Oliver í Hoyvík, formaður í stýri Ferðaráðsins hildu uppá, at ein møgulig oljuvinna fer at kollvelta føroysku ferðavinnuna.

– Vit fara at uppbyggja eitt heilt nýtt klientel, sigu Petur Oliver í Hoyvík.

Eisini útoyggjarnar fingu eitt orð við á vegnum. Petur Oliver í Hoyvík vísti á, tað manglar nógv hjá ferðavinnuni í útoyggjunum. Petur Oliver nýtti Mykines sum dømi sum eina útoyggj sum ikki fekk nóg nógv burturúr ferðavinnuni. Útoyggjaálitið vísir eisini á nøkur sovorðin viðurskifti, men Bjarni Djurholm heldur ikki, at vit skulu stara okkum blind eftir tvørleikum.

Fyri fyrst bíðar uppskotið eftir at vera lisið av landsstýrismanni og øðrum. Síðani bíðar mestir ein politisk viðgerð.



*Bjarni Djurholm fekk hósdagin handað uppskot um ferðavinnupolitikk í Føroyum*


**BODY BIKE**

**Frá 20. august til 20. oktober**

**Tíðirnar verða:**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| | | | | 15.00-16.00 Weekend-burner |
| 16.30-17.30 Byrjarar | 16.30-17.30 Vand | 17.00-18.00 Fatburner | | |
| 18.00-19.00 Fatburner | 18.00-19.00 Byrjarar | | 18.30-19.30 Byrjarar | |

Kostnaður fyri eitt skeið (fastar tíðir):
1x vikuna kr. 390,-
2x vikuna kr. 620,-
3x vikuna kr. 840,-

Kostnaður pr. ferð (ikki fastar tíðir):
1 ferð kr. 50,-
10 ferðir kr. 400,-
10 ferðir (limir) kr. 275,-

**Gjaldast skal við tilmelding til skeiðið í FRAGD & FIMI LEYGARDAGIN 18. aug. millum kl. 14.00 og 17.00**

Fragd & Fimi

UPPLÆTINGARTÍÐIR

**Tað besta tú kanst bjóða tær sjálvum**